Bretski uttanríkismálaráðharrin Robin Cook við løgmann:

Latið okkum finna eina loysn í marknatrætuni

-sum er til gagns fyri bæði londini



Bretski uttanríkisráðharrin, Robin Cook, heitir í brævi á løgmann um at finna eina skjóta og góða loysn fyri báðar partar í marknatrætuni millum Bretland og Føroyar

JAN MULLER

Anfinn Kallsberg, løgmaður fekk mikudagin bræv frá bretska uttanríkisráðnum við lukkuynskjum frá sjálvum tí bretska uttanríkisráðharranum, Robin Cook. Hann ynskir nýggja løgmanni tillukku og vónar at fáa gott samstarv við nýggja landsstýrið í framtíðini.

Anfinn Kallsberg sigur, at innihaldið í hesum brævinum er alment. Hann heldur ikki nakað løgið vera í, at umboð fyri bretsku stjórnina á henda hátt senda góðynski beinleiðis til eitt nýtt landsstýrið. -Mær vitandi er hetta sambært protokollina, og vit takka sjálvandi fyri góðynskini frá grannanum fyri eystan.

Tað hevur eydnast Sosialinum at fáa innlit í brævið, sum er soljóðandi:

„Pleace accept my warm congratulations on your becoming løgmaður of the Faroe Islands. Britain and the Faroes both have comparatively new governments in office. We also have considerable economic interests in common. I hope your appointment can mark a fresh start in our discussions about oildelimitation. We are ready to search for an early settlement, which I am sure you also desire. Our aim is to reach an inquitable agreement of mutual benefit as between friendly neighbours. I whery much hope, that we shall be able to work together.

With every good whish for your time in government.
Robin Cook"

(Á føroyskum: Hjartaliga tillukku við løgmansstarvinum. Bretland og Føroyar hava bæði fingið nýggja stjórn innan stutta tíð. Vit hava felags búskaparlig áhugamál. Eg vóni, at tygum í løgmansstarvinum kunnu birta upp undir eina nýggja byrjan í marknasamráðingunum. Vit eru til reiðar at finna eina skjóta avtalu, sum óivað eisini hevur tygara áhuga. Mál okkara er at finna eina rættvísa avtalu, ið er til gangs fyri báðar partar, sum millum brøðratjóðir. Stóra ynski mítt er, at vit kunnu samstarva.

Við øllum góðynskum í tíni løgmanstíð

Robin Cook)

Kallsberg, Nyrup og Blair í Keypmannahavn mánakvøldið

Umboðini fyri landsstýrið fara til Danmarkar mánadagin og skulu til samráðingar týsmorgunin. Anfinn Kallsberg, løgmaður segði við Sosialin í gjár, at ætlanin var ikki at taka marknatrætuna við bretar upp á sjálvum fundinum við donsku stjórnina, men at tað var ikki óhugsandi, at tað varð gjørt í einum øðrum samanhangi.

-Um hetta samanhangið er tað heldur margháttliga samantreff, at mánakvøldið eru bæði Anfinn Kallsberg, løgmaður, Poul Nyrup Rasmussen, forsætisráðharri og Tony Blair, forsætisráðharri í Danmark samtíðis skal ikki vera sagt her. Men lagnunnar speisemi ella ikki - so eru teir tríggir í danska høvuðsstaðnum um somu tíð mánadagin.

Tony Blair er í Keypmannhavn saman við m.a. Robin Cook og øðrum bretskum ráðharrum í sambandi við, at Bretland hevur formansskapin í ES. Teir skulu hitta Nyrup og umboð fyri donsku stjórnina.

Uppá fyrispurning um tað er ætlanin, at løgmaður, danski og enski forsætisráðharrin skulu tosa um marknatrætuni sigur Anfinn Kallsberg, at tað veit hann als einki um. -Hetta má vera tann reina tilvild, tí vit skulu møta til samráðingar tíðliga týsmorgunin, og tí mugu vit avstað mánadagin.

Tað var annars fyrrverandi løgmaður, Edmund Joensen, sum í brævi 27. januar í ár heitti á Poul Nyrup Rasmussen um at taka upp marknamálið við bretska forsætisráðharran og royna at skipa fyri einum fundi á hægsta stigi millum teir tríggjar leiðararnar í Danmark, Føroyum og Bretlandi.

Síðani tá er einki komið fram alment um málið. Danska blaðið Politiken spurdi í vikuni forsætismálaráðið um, hvat Nyrup hevði fyritikið sær í málinum. Hann vísti til Uttanríkismálaráðið.

Anfinn Kallsberg, løgmaður undan samráðingunum í Keypmannahavn:

Allar bindingar millum Føroyar og Danmark skulu burtur

JAN MULLER

-Eg vóni, at alt løgtingið stendur saman sum ein maður, nú tá farið verður til Danmarkar at samráðast sigur Anfinn Kallsberg, løgmaður nú fáar dagar undan samráðingunum.

Hann hevði fund við Uttanlandsnevndina mikudagin, har greitt varð frá uppleggi landsstýrisins. Uttanlandsnevndin hevði so innanhýsis fund í gjár um hetta uppleggið. Tað er ikki greitt, um ein samd nevnd tekur undir við uppleggınum frá landsstýrinum, men formaðurin í nevndini, Jóannes Eidesgaard segði við Sosialin í vikuni, at tað er sera umráðandi, at landsstýrið fer til Danmarkar við einum samdum tingi aftan fyri seg.

Talan er um eitt samt landsstýrið, sum fer til Danmarkar. Hóast tað kann skiljast sum, at løgmaður og landsstýrismaðurin í sjálvstýrismálum eru ósamdir um sjálvstýrisspurningin, nú samráðingar skulu vera, so sigur Anfinn Kallsberg, at teir eru samdir. Talan er um at loysa nøkur akutt mál og so at nema við onnur, sum skulu avgreiðast uppá longri sikt og sum eisini eru niðurfeld í samgonguskjalið. -Hetta er eitt nógv størri mál, sum ikki nú kann viðgerast út í æsir. Vit taka tað fram og syrgja fyri, at tað vit gera nú, ikki verður ein forðing fyri tí víðari prosessini.

Burtur við bindingum

Anfinn Kallsberg sigur við Sosialin, at landsstýrið fer til Danmarkar við tí fyri eygað at fáa allar hugsandi bindingar, sum eru millum Danmark og Føroyar, burtur. Her sipar hann til bindingarnar í teimum avtalunum, sum vórður gjørdar í 92 og úteftir millum londini. Har var nógv uppílegging í føroyskan politikk.

-Við tíðini eru rættiliga nógvar av hesum bindingum burtur, men har hanga nakrir lepar eftir, sum vit leggja upp til at fáa burtur sigur løgmaður.

Tær bindingar, sum løgmaður m.a. hugsar um, eru eitt nú kravið um eina kvotaskip, sum teir tó síðandi hava tikið aftur.

Løgmaður sigur, at miðjað verður móti at gera eina heilt nýggja avtalu, sum als einki hevur við hinar gomlu at gera.

Uppá fyrispurning hvat landsstýrið ætlar at fyritaka sær, um danir tvíhalda um at hava javnbjóðis rættindi og møguleikar eisini fyrimunir fram um aðrar í menningini av eini føroyskari oljuvinnu sigur Anfinn Kallsberg, at landsstýriðn hevur ikki sum so fingið nøkur signal tann vegin.

-Men er tað ikki óheppið mótvegis altjóða oljuheiminum, sum vit vilja hava til Føroya at gera stórar íløgur, um danska stjórnin fær tvingað føroyingar at taka við í eina avtalu fyrimunir fyri danskar fyritøkur?

-Eg haldi, at allar bindingar ella nakað annað á tí økinum eru óhepnar, sum vit mugu gera alt fyri at sleppa undan.

Løgmaður sigur annars, at hann ætlar sær ikki at tjakast við danir gjøgnum føroysku pressuna. -Latið okkum nu síggja, hvussu fer at gangast